nøvn nú

## Heilsanir



***Hey Gestur***
Nú eru bert 5 dagar eftir!



***Gó›a Edith***
Hjartaliga tillukku vi› 13 ára degnum.
***Heilsan mamma, babba, Jóan Pauli og Hektor***



***Gó›a omma***
Hjartaliga tillukku vi› 60 ára degnum 14.9. ynskja vit øll.
***Poli, Karla Maria, Linda og lítlibeiggi***



***Gó›a Edith***
Hjartaliga tillukku vi› 13 ára degnum í dag, sov nú ikki øll tannárini burtur.
***Kærar heilsanir vit 4***





***Gó›i elska›i Margeir***
Hjartaliga tillukku vi› 6 ára fø›ingardegnum. Jesus pápin signi framtí› tína.
***Ynskja omman og abbin í Sumba***



Ta› sum tyrlan ikki kann, ta› kunnu vit. P. S. De red mod vest gó›i vinur. Tillukku vi› fø›ingardegnum
***Marita og Hans Pauli***



***Gó›i Margeir***
Hjartaliga tillukku á 6 ára degnum í dag. Ja, nú ert tú blivin ein stórur drongur.
***Ynskja fastir, Eirik, Esther og Vivian***



***Gó›u babba og Beinta***
Hjartaliga tillukku vi› 24 og 2 ára degnum 14.9. alt gott í framtí›ini.
***Ynskja Fró›i og Irena***



***Gó›a kona***
Hjartaliga tillukku vi› teimum 1/4 hundra›.
***Heilsan Eivind***
P. S. Her sært tú gott út



## T¿kk



Hjartaliga takka vit øllum, sum settu dám á silvurbrúdleyp okkara 15. august. Takk til tykkum øll, sum vi› vøkrum sangi gleddu okkum á morgni, sjálvan brúdleypsdagin. Og til tykkum mongu, sum gleddust saman vi› okkum veitslukvøldi›. Takk fyri alla hjálp, fyri heilsanir, fjarrit, blómur og gávur. Hesir dagar fara altí› at liva í minni okkara. Harrin signi tykkum øll.
***Blí›ar heilsanir Sigrun og Eivind***

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** 25,- kr.

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ..............................................................

..............................................................

..............................................................

..............................................................

..............................................................

..............................................................

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn: ..............................................................

Bústaður: ..............................................................

Bygd/býur: .............................. Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«



## Tiltøk

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 kvøldmøti.

### Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

### KFUM og KFUK í Havn
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús, fyri ung.

### Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 20, allar kvinnur eru vælkomnar.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 møti, Palli Petersen talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Toril og Niels Edvard Olsen.

### Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19 A.T.A.P. (Barnaklubbi).
Missiónskonferansa við Jørn Hyldgaard úr Danmark. Fríggjakvøldið kl. 20 missiónsmøti.
Leygarmorgunin kl. 10-12 leiðarasamling, kl. 20 missiónsmøti.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli, kl. 18 missiónsmøti.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 8.30-9.30. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Svenhild og Harald Haraldsen. Øll eru vælkomin.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 møti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Filadelfia, Sundalagi
Bønarbólkur úr Havn hevur møti í Hósvík sunnukvøldið kl. 18.

### Kirkjan, Norðskála
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Meinigheitshúsið á Skála
Sunnukvøldið kl. 19 møti við Signar á Reynatrø. Verið hjartaliga vælkomin.

### Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Irenu Bech, Skipanes.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6-7. Verið hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús, ung frá Rhema luttaka.
Sunnudagin kl. 17 møti við Rannvu og Eiler á Royðutoft. Barnamøti kl. 17.
http://www.keldan.fo

### Karmel, Eiði
Møtirøðin heldur fram í dag kl. 20, Frits Thomsen talar. Jóhanna, Hallgerð og Marita syngja. Bønarløta verður kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betania, Skopun
Sunnudagin kl. 10.15 sunnudagsskúli, kl. 11 morgunmøti, kl. 19 kvøldmøti, Símun Jacobsen talar. Øll eru vælkomin.

### Zion, Sandur
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Hanus Poulsen, Leirvík og Hallur Ludvig. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Sigmund, Gimmi og Samael.
Mánadagin kl. 20 heimaforbundið.

### Sion, Vágur
Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11, sunnudagsskúli kl. 11.30 og møti kl. 16.
Telefonandakt 373 777.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

### Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagur 11.9.*
kl. 10-12 Ítriv
kl. 14-18 Hugnaløta við nál og práti
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikud.
**Í vetur verður matgerð í Tilhaldinum undir kvøldskúlaskipanini, hvønn mikudag kl. 10.00-13.30. Tilm. tlf. 421580 Anne Grethe Harlou.**
*Týsdagur 12.9.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát og annað
*Mikudagur 13.9.*
kl. 10 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 14.30 Túrur
*Hósdagur 14.9.*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagur 15.9.*
kl. 10-17 Opið hús
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### 1000 ára haldið
Sunnudagin 17. kl. 16 heldur Hanus A. Samuelsen fyrilestur um Halgidagsiðir í **Rituvíkar kirkju**.
Sunnudagin 17. kl. 16 heldur Petur J. Sigvardsen fyrilestur um íslendska sálmaskaldið Hallgrímur Pétursson í bygdarhúsinum í **Skálavík**.

### Losjan í Havn Tinghúsvegur 18
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

### Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Vága gongufelag
Um viðrar, verður farið til gongu niðan í Glyvur, norðanfyri Vatnsoyrar sunnudagin 17. kl. 14. Byrjað verður norðanfyri Vatnsoyrar. Havið kaffi og góð gonguklæðir við. Tilmelding hjá Ferðavinnuni í Vágum, tlf. 333455 ella 213455.

### Felagið Tórshavn spákingartúrur
**Leygardagin 16. sept.** verður spákingartúrur í Havnini: Markið millum Eystara og Vestara Húsagarðsfesti. Byrjað verður við Svartafoss kl. 15.
**Sunnudagin 17. sept.** verður gongutúrur niðan á Stiðjafjall. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14. Havið drekkamunn við og heit og góð gonguklæði. Tilmelding.

### Eysturoyar gongufelag
skipar fyri túri niðan á »Sátuna« (norðan fyri Skælingsfjall) nú sunnudagin 17. sept. Gingið verður frá vegsvinginum norðan fyri grótbrotið í Hundsarabotni kl. 14. Tilmelding á Eysturoyar Kunningarstovu í Fuglafirði, tlf. 444860 ella fax 445180.

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.

### AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

### Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt mánakvøld á skrivstovuni hjá Bláa Krossi á Glyvrum, kl. 20-21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

### LISA
*skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya* í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

### LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

### Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

### Amnesty International Føroya deild
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

### Útoyggjanevndin
Hevur tú eitthvørt uppskot ella meining um hvussu útoyggjarnar kunnu mennast, so hava tygum møguleika at greiða frá hesum á heimasíðuni hjá nevndini www.utoyggj.fo ella við at senda e-post. til utoyggj@utoyggj.fo

### Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

### Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
er opin hvørt mikukvøld kl. 20.00.
1., 2. og 4. hvørt mikukvøld: drekkamuður, óformelt orðaskifti og upplýsing um Bahá'í.
3. hvørt mikukvøld: bønarmøti og drekkamuður aftaná.
***Bahá'í-samfelagið í Tórshavn***

### Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

### Javni
*Skrivstovan er opin hesar tíðir:*
Mánadag stongt!
Týsdag-hósdag kl. 11-14.
Fríggjadag kl. 11-15.
Tlf.: 314827 ella 216510
Fax: 310557
E-mail:
javni@post.olivant.fo

### Giktafelag Føroya
*MBF Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 fax 310813*
Opið týs. og hósdag kl. 10-13.
Foreldrabólkurin: Betty og Noel Joensen, tlf. 457337 eftir arbeiðstíð.
Bólkurin Ung: Sára Tummassardóttir, tlf. 373106.

### Føroya Astma/ Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

### Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er stongd vegna summarfrí, frá mikudegi 23. august til og við týsdagin 5. september.

### Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

### Nærvarpið LUMI radio í Aalborg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

### Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

### Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

## 80 ár

**Leygardagin 16. sept. verður Johs. Andr. Næs 80 ár. Hann heldur dagin heima á Sólteigi 6 við einum drekkamunni seinnapartin millum kl. 15-18. Kvøldið verður hildið saman við familjuni.**

## Prógv

**Áki Andreasen, Argir, hevur lokið yrkisútbúgving innan skrivstovuyrki — fyrisiting. Lærupláss: P/F Ivan Johansen Bilar, Tórshavn.**

**Dávid Reinert Davidsen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsnikkari. Lærupláss: P/F Bygningssnikkaravirkið BSV, Tórshavn**

**Levi Jóhannes Lauritsen, Sørvágur, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Lærupláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Tórshavn.**

**Dan av Lofti, Tórshavn, hevur tann lokið yrkisútbúgving sum grafiskur trykkjari. Lærupláss: P/F Dimmalætting, Tórshavn**

**Allan Jacobsen, Vágur, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Lærupláss: Bent Mortensen, Maskinverkstaður, Vágur.**

**Harald Hammer, Strendur, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Lærupláss: P/F Skipasmiðjan á Skála, Skáli.**

**Elin Petersen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving innan almenna fyrisiting - kommunu. Lærupláss: Tórshavnar Býráð, Tórshavn.**

**Trygvi Breyt Hermansen, innan Glyvur, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Lærupláss: P/F Skipasmiðjan á Skála, Skáli.**

**David Nordendal, Argir, hevur lokið yrkisútbúgving innan heilsølu. Lærupláss: Landshandilin P/F, Tórshavn**

**Jónsvein Bergson Thomsen, Skopun, hevur lokið yrkisútbúgving sum træskipasmiður. Lærupláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Tórshavn.**

**Niels Thomsen, Strendur, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Lærupláss: P/F Tórshavnar Skipasmiðja, Tórshavn**

**Mortan Joensen, Norðagøta, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Lærupláss: P/F F.J.M., Runavík.**